MTHøjgaard



# Nýggjar íbúðir

## á Boðaneshamri í Havn






Á Boðaneshamri, Yviri við Strond, verða ætlandi bygdar 32 eigaraíbúðir. Íbúðirnar koma at liggja uppi á hamrinum og fara allar at hava framúrskarandi útsýni.

Talan er um 4 sløg av íbúðum, ið verða 68 fermetrar umframt at tær hava stóra terassu. MTHøjgaard er byggiharri og góðskan verður allan vegin sett í hásætið.

Um tú vilt vita meira, so ert tú vælkomin at seta teg í samband við Inni.

inni – trygt og ómakaleyst til hús

P/f Inni · Meklarafelag · N. Finsensgøta 37 · Tórshavn · Tel 320410 · Fartel 520410 · www.inni.fo



# Kennist sum treytaleys uppreisn

**Eftir summarfrítíðina byrjar Sigurd Bærentsen aftur sum lærari í Skopunar skúla, eftir at hann fyri tveimum árum síðan varð fluttur í Sandoyar Meginskúla orsakað av innanhýsis ósemju í skúlanum í Skopun**

STARVSETAN
*Edvard Joensen*



*Sigurd Bærentsen, lærari, sum í 2002 varð fluttur úr Skopunar skúla í Sandoyar Meginskúla, er nú eftir tilmæli frá skúlastýrinum í Skopun settur aftur sum lærari í Skopun. – Eg kenni hetta sum eina treytaleysa uppreisn, sigur hann*

Sigurd Bærentsen verður aftur lærari í Skopun, tá farið verður í skúla eftir summarfrítíðina. Tað hevur hann fingið at vita í brævi frá Mentamálaráðnum. Tað er eitt samt skúlastýri í Skopun, sum hevur mælt til at seta Sigurd Bærentsen aftur í starv í Skopun.

Tað var eftir eina innanhýsis ósemju í Skopuna skúla, at Mentamálaráðið í 2002 gjørdi av, at táverandi fyrstilærarin skuldi flytast úr skúlanum. Fyrstilærarin fekk starv við Hoyvíkar skúla. Sigurd Bærentsen, lærari, varð fluttur í starv við Sandoyar Meginskúla.

– Hetta kundi uttan víðari gerast sambært setanarskrivinum, sigur Sigurð Bærentsen. So tað var einki at siga um tað. Men grundgevingina fyri flytingini dámdi mær ikki, sigur hann.

Grundgevingin var, at hann sum partur av teirri ósemju, sum var, skuldi flytast úr skúlanum, fyri at geva nýggja fyrstalæraranum betri møguleikar at skipa arbeiðið í skúlanum.

– Men eg meti meg ikki at hava verið nakran part í nakrari ósemju, sigur Sigurd Bærenstsen. Og tað, at eg nú fái at vita frá Mentamálaráðnum, at eg eri fluttur aftur í Skopunar skúla at arbeiða sum lærari, taki eg sum eina uppreisn og staðfesting av, at tað var ikki eg, sum var orsøk til nakra ósemju.

Sigurd Bærentsen sigur, at han hvørki hevur søkt burtur ella aftur í Skopunar skúla.

Hann varð biðin um at søkja á Meginskúlan, men gjørdi tað ikki. Sostatt varð hann fluttur, sum Mentamálaráðið eisini hevði rætt til.

Í august í fjør fekk hann at vita frá táverandi landsstýrismanninum við mentamálum, Høgna Hoydal, at hann kundi søkja aftur til Skopunar í fyrsta lagi 1. august 2004.

Tað hevur hann ikki gjørt, sigur Sigurd Bærentsen, heldur enn at hann søkti burtur. Men skúlastýrið í Skopun hevur einmælt heitt á Mentamálaráðið um at seta Sigurd Bærentsen aftur í starv, og hesum hevur Mentamálráðið so skrivliga boðað honum frá, at Mentamálaráðið hevur gjørt, sigur hann.

Sigurd Bærentsen sigur, at sjálvandi fegnast hann um, at hann nú kemur aftur í tað starvið, hann frammanundan hevði røkt í 28 ár. Men hetta hevur verið ein keðilig tíð. Ikki minst fyri familjuna, sigur hann.

Um hann fer at undirvísa í somu lærugeinum, sum hann plagdi, veit Sigurd Bærentsen ikki enn.

– Fyribils hevur fyrstilærarin heitt á meg um at koma við ynskjum um, hvørjar lærugreinar eg kundi hugsað mær, sigur hann.

# Skúlastýrið átti avgerðina

**Tað var í grundini skúlastýrið í Skopun, sum gjørdi av, at Sigurd Bærenstsen skuldi aftur í starv við Skopunar skúla. Mentmálaráðið var bundið av brævi, sum fyrrverandi landsstýrismaðurin hevði sent flutta lærararanum**

STARVSSETAN
*Edvard Joensen*



*Skopunar skúli fær nú ein gamlan kenning aftur í starv. Sigurd Bærentsen, sum eftir 28 ár sum lærari í Skopun var fluttur á Sandoyar Meginskúla í 2002, er nú av Mentamálaráðnum fluttur aftur til Skopunar*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Táverandi landsstýrismaðurin við mentamálum, Høgni Hoydal, skrivaði 13. august í fjør Sigurdi Bærentsen, lærara, eitt bræv, har landsstýrismaðurin segði, at um Sigurd Bærentsen søkti, ella skúlastýrið í Skopun heitti á Mentamálráðið um at flyta Sigurd Bærentsen aftur í starv sum lærari við Skopunar skúla, hevði hann rætt til hetta. Tó í fyrsta lagi tann 1. august 2004.

Og tað er júst hetta, sum hent er nú. At skúlastýrið í Skopun hevur heitt á Mentamálaráðið um at seta Sigurd Bærentsen í starv aftur í Skopun, sigur Jenny Lydersen, undirvísingarleiðari á Fólkaskúladeildini á Mentamálaráðnum.

– Tá innstillingin frá skúlastýrinum kom til okkara, varð kannað hjá løgfrøðingi, hvussu farast skuldi fram, sigur hon. Og har var als eingin ivi. Brævið frá landsstýrismanninum, sum er dagfest 13. august 2003, er so mikið griett, at tað skuldi bara fylgjast. Sigurd Bærentsen er sostatt settur í starv aftur í Skopun frá 1. august 2004 at rokna.

Jenny Lydersen sigur, at dentur er lagdur á í innstillingini frá skúlastýrinum í Skopun, at tað er eitt samt skúlastýri, sum einmælt innstillar Sigurd Bærentsen.

Har vóru ikki so nógvir valmøguleikar, sigur undirvísingarleiðarin, tí hóast eitt starv var leyst í Skopun, varð ongantíð søkt eftir lærara. Skúlastýrð metti, at lærari var tøkur sambært skrivinum frá landsstyrismanninum frá august í fjør, og tí var Sigurd Bærentsen einmælt innstillaður til starvið, sum leyst var.